# Ikki til at vita við oljuprísunum

**– Vit kunnu ikki siga, hvat fer at henda við prísunum um tvær vikur, sigur Hákun Djurhuus, stjóri fyri Føroya Shell**

OLJUPRÍSIR
*Heri á Rógvi*

3. januar hækka prísurin á olju og bensini við ellivu oyrum hjá Føroya Shell, og stutt frammanundan hevði Statoil eisini hækkað sínar prísir.

Orsøkin til hækkanina er einføld: ráoljuprísirnir uttanlands eru hækkaðir munandi.

– Ì desember hækkaði prísurin á ráolju við 17%. Hetta skyldast vantandi forsýning úr Venesuela, og tað er hetta, ið vit merkja í dag, sigur Hákun Djurhuus, stjóri í Føroya Shell.

Verkfall hevur verið í Venesuela, og teir 3 milliónir tunnurnar frá Venesuela av ráolju eru ikki komin á amerikanska marknaðin, sum tað annars er vanligt.

– Marknaðurin er øgiliga væl balanseraður. Tá tríggjar milliónir av 72 ikki verða framleiddar, so ger hetta mun, sigur Hákun Djurhuus.


*Prísurin á bensini á olju er voksin í ár, men framtíðin er ring at spáa um.*

Sum marknaðurin er háttaður í løtuni og við teimum hóttanum um kríggj og annað sum eru, so ilt at spáa um framtíðargongdina.

– Tað er einki, sum týðir upp á, at vit fara at hækka prísin í morgin. Men vit kunnu ikki siga, hvat fer at henda við prísunum um tvær vikur, sigur Hákun Djurhuus.

### Príshækkingar

Sum nevnt fór prísurin á bæði olju og bensini upp 3. januar og ein príshækking var eisini síðst í farna ári.

Hjá Shell eru prísirnir á olju 3.725 kr. við øllum fyri 1.000 litrar til húsarhald. Skipini fáa 1.000 litrar fyri 2.340 kr.

Blýfrítt bensin kostar í dag 7,44 fyri liturin á Shell støðunum – kalium kostar 12 oyru meira fyri liturin. Diesel oljan til bilar kostar 4,90 kr. fyri liturin í skrivandi stund.

Hákun Djurhuus upplýsir, at tað mest vanligt er, at prísurin á ráolju hækkar fyrst, og so hækkar prísurin á teimum ymsu produktunum, t.e. diesel olja til bilar, brennievni til flogfør osfr.

Vanlig gasolja hækkaði við 10% í desember, men samstundis minkaði virðið á dollaranum, soleiðis at munurin ikki gjørdist so stórur kortini.

– OPEC plagar at duga ógvuliga væl at regulera. Teir hava úttalað, at teir eru nøgdir við ein prís, ið liggur millum 22 dollarar og 28 dollarar. Teir hava eisini regulerað fyri at halda prísin á hasum støðinum. Ì løtuni er prísurin 29 dollarar, sigur Hákun Djurhuus.

Vit royndu eisini at fáa eina viðmerking frá leiðsluni í Statoil, men hetta eydnaðist okkum ikki.

# Fiskasølan satsar upp á laks

**Við at keypa framleiðslutólini í Góðskingarvirkinum í Fuglafirði fer Fiskasølan aktivt inn í framleiðsluliði. Hetta er partur av framtíðarætlanunum hjá fyritøkuni**

FISKIVINNA
*Heri á Rógvi*

Føroya Fiskasøla hevur keypt framleiðslutólini á Góðskingarvirkinum í Fuglafirði. Tólini verða keypt frá alifelagnum East Salmon.

– Framtíðarætlanirnar hjá Fiskasøluni eru umfatandi. Hesar hava vit í leiðsluni arbeitt við í fýra mánaðir, sigur Árni Arge, stjóri fyri Føroya Fiskasølu.

Vit ætla m.a. at satsa upp á laksaframleiðslu. Laksurin verður aldur, og tað er ikki so svikaligt við honum sum við øðrum fiskasløgum, sigur Àrni Arge.

Tað er ætlanin hjá Føroya Fiskasølu at gera seg galdandi á øðrum økjum enn í søluliðinum, og tí hava teir tikið hetta stigi í framleiðsluliðið.

–Vit hava ásannað, at tað er trupult bara at fáast við at selja. Við hesum stiginum kunnu vit sjálvir avgera, hvat vit selja. Hetta gevur nakrar fyrimunir, men sjálvandi eisini nakrar vansar, sigur Àrni Arge.


*Føroya Fiskasøla hevur nú yvirtikið raksturin av Góðskingarvirkinum í Fuglafirði. Virkið kallast nú fyri Fiskavirki í Fuglafirði*

*Mynd: Øssur Mohr.*

Hann heldur ikki, at tað Fiskasølan við hesum stiginum átekur sær nakran serliga stóran váða í mun til ikki at gera íløguna.

Áður hevur Føroya Fiskasøla tikið sær av at selja úrdráttirnar hjá Góðskingarvirkinum. Føroya Fiskasøla eigur frammanundan 30% av partapeninginum í East Salmon.

### Nýtt navn

Framleiðslan á virkinum, hvørs nýggja navn er Fiskavirkið í Fuglafirði, verður framhaldandi tann sama, nevniliga laksaúrdráttir, skrivar Fiskasølan í tíðindaskrivi.

Í løtuni starvast um fjøruti fólk á virkinum. Sagt verður í tíðindaskrivi, at virksemi verður ætlandi økt, soleiðis at støðugt arbeiði verður á virkinum.

Stjóri fyri virkið verður Rógvi Reinert. Eitt rakstrarfelag er stovnsett at reka virkið. Rógv Reinert var seinast frammi í miðlunum, tí hann varð settur sum innkeyps- og framleiðslustjóri í Føroya Fiskasølu. Hetta starv fer hann framvegis at røkja.

– Aktiviteturin á virkinum kann væl tvífaldast innan stutta tíð, sigur Rógvi Reinert.

Hann leggur stóran dent á, at pláss er fyri vøkstri, men tað mest umráðandi er ikki at veksa um vøksturin á framleiðsluni, men teir ætla eisini at fremja vøkstur í vøruútboði og framleiðslu- og pakkingarhættum.

Virkið framleiðir umleið 2.500 tons um árið.

– Vit meta, at hetta er ein íløga, sum kann geva avkast. Fiskasølan fer framvegis at fáast við at selja fyri onnur sum áður, men vit royna eisini okkurt nýtt, sigur Rógvi Reinert.

## Aldubáran og Mari Boine

**Greitt er nú, at Mari Boine og Aldubáran vera við á Listastevnuni í ár**

LISTASTEVNAN
*Heri á Rógvi*

Fyrireikingarnar til komandi Listastevnuna er væl ígongd. Fyrr í vikuni frættist, at víðagitni rithøvundurin Fay Weldon leggur leiðina til Føroya í august.

Fyrireikararnir hava eisini sett klassiska tónleikabólkin Aldbubáruna á skránna á Listastevnuni, sum verður í døgunum 7. til 17. august.

Oddvá Nattestad, samskipari, upplýsir, at Aldubáran mest sannlíkt fer at hava eina konsert.

Afturat Aldubáran verður kenda norska songkvinnan Mari Boine við á Listastevnuni. Enn er alt ikki heilt komið undir land, men tað er líka við, verður upplýst.

Mari Boine hevur víst áhuga fyri at koma til Føroya, og nú skulu teir síðstu smálutirnir fáast frá hondini.

Mari Boine er av samiskum uppruna, og hon hevur rættiliga vakt ans í útheiminum.

Sjálv spælir Mari Boine fleiri ljóðføri og hennara tónleikur er ógvuliga blandaður. Hon hevur framført við nógv stór høvi og saman við fleiri heimskendum tónleikarum.

Tann samiski upprunin hjá henni er ógvuliga sentralur í hennara tónleiki, og hetta ger hana til nakað serstakt.

Umframt Aldubáruna og Mari Boine eru samráðingar í løtuni við írska leikbólkin Siamsa Tíre.

Tey framføra nakað, sum kundi mint um Riverdance, men á einum minni skala.

Enn er einki avgjørt um, hvørt tey koma til Føroya, ella hvat tey kunnu hugsast at fara at framføra.


*Aldubáran skal hava konsert á Listastevnuni í august*



# Handritið avdúkar fyrstu skaldsøguna eftir William

**Gátuføra handritið eftir William Heinesen, sum er komið undan kavi, er skaldsøgan »Den yderste tid«. Hetta er fyrsta skaldsøgan, sum William skrivaði, men hon varð ongantíð útgivin. Heinesenfjepparar høvdu verið glaðir, um handritið kom út sum endurprent, heldur Jess Jessen, antikvarbókahandlari, ið hevur tað í varðveitslu**

WH-HANDRIT
*Ingi Rasmussen*


*Hetta er eitt vælskrivað og rímiliga gjøgnumrættað handrit við einstøkum villum, ið hevur verið nærum klárt til prentingar, sigur Jess Jessen, stjóri á Frederiksberg Antikvariat, sum hevur handritið til fyrstu skaldsøguna hjá Williami Heinesen í varðveitslu*

*Mynd: Peter Hove Olesen (Politiken)*

»Jeg gør det ikke af grådighed, men alene af kærlighed til Heinesens forfatterskab.«

Soleiðis sigur danin Jess Jessen, stjóri í Frederiksberg Antikvariat, ið ætlar at útgeva eitt sjáldsamt handrit eftir William Heinesen, sum hann hevur fingið hendur á. Handritið stavar frá búgvinum eftir Munksgaard, ið gav nógv út eftir William Heinesen.

Talan er um eitt ungdómshandrit til eina skaldsøgu frá einaferð í 1920-unum, sum ongantíð kom út. William Heinesen nevndi skaldsøguna »Den yderste tid«, og handritið er 358 síður til longdar. Sostatt er talan um ta fyrstu skaldsøguna, sum William Heinesen yvirhøvur hevur skrivað, og tí hevur tað stórt bókmentaligt virði.

### Vrakað handrit

Antikvarbókahandlarin kundi hugsað sær at givið handritið út sum endurprentað handrit í fýra litum.

– Hetta er eitt vælskrivað og rímiliga gjøgnumrættað handrit við einstøkum villum, ið hevur verið nærum klárt til prentingar. Vit síggja, at tað er Otto Gelsted, vinmaður og kritikari Williams, sum hevur vent tummilin niðureftir, so tað ongantíð er útkomið. Men vit halda, at handritið er so mikið væl skrivað, at tað væl tolir dagsins ljós, sigur Jess Jessen.

Spurdur, hví Otto Gelsted mundi hava vrakað handritið, svarar Jess Jessen, at tað helst var tí, at Gelsted hevði størri áhuga í yrkingum enn skaldsøgum hesa tíðina.

Eftir at Sosialurin í síðstu viku umrøddi handritið, sum vit tá ikki kendu heitið á, hevur eitt nú Jógvan Isaksen, bókmentafrøðingur, funnist at ætlanini at geva tað út. William Heinesen livdi í nógv ár eftir, at handritið varð vrakað, so hann hevði havt allar møguleikar at givið tað út seinni, um hann vildi tað, segði Jógvan Isaksen við Útvarpið. Arvingarnir himprast eisini, og sonurin Zacharias Heinesen ætlar sær at lesa handritið væl, áðrenn hann tekur nakra avgerð, hevur hann greitt Sosialinum frá.

### Góðskan er høg

Jess Jessen leggur dent á, at hann kundi ikki droymt um at givið skaldsøguna út í bók – einans sum endurprentað handrit.

– Tað hevði verið órættvíst ímóti høvundanum at givið tað út sum skaldsøgu, tí hann fær av góðum grundum ikki lisið tað ígjøgnum áðrenn. Hinvegin hevur handritið eina góðsku, ið livir upp til skaldskapin hjá William Heinesen, og tað er ongin trilvandi roynd, sum spillir navnið hjá honum. Tvørturímóti, siga tey fólkini mær, sum hava lisið tað ígjøgnum og hava innlit í skaldskapin hjá høvundanum, sigur Jess Jessen.

Hann hevur verið í sambandi við Bob Erland, sum er enskur professari í bókmentum. Professarin hevur góðskustemplað handritið og skal eftir ætlan skriva okkurt afturvið útgávuni, um hon verður av nøkrum.

### Ongan vinning

Familjan eftir William Heinesen hevur fingið bjóðað 50.000 krónur frá Jess Jessen afturfyri, at handritið verður útgivið.

Jess Jessen leggur ferð eftir ferð áherðslu á, at hann ikki ger hetta við vinningi fyri eyga, men einans við skaldskapinum í huga. Honum dámar sjálvur ógvuliga væl skalskapin hjá Williami Heinesen og hevur savnað nógvar bøkur eftir hann.

– Eg haldi sjálvur, at eg havi viðgjørt hetta so sømiliga sum gjørligt, og eg vil gjarna undirstrika, at eg geri onki uttan við undirtøku frá arvingunum. Eg kann ikki vinna pening við hesum, men eg haldi, at Heinesenfjepparar høvdu verið sera fegnir um møguleikan at sloppið at lisið handritið, sum jú er fyrsta skaldsøgan eftir størsta føroyska høvundan, sigur Jess Jessen.

Spurdur, um handritið ikki heldur hoyrir heima á antin Føroya Landsbókasavni ella Kongliga Bókasavninum, har bókakøn kunnu lesa tað, hava tey hug, svarar Jess Jessen, at har endar tað óivað einaferð.

**Fakta**

Skaldsøgur eftir William Heinesen

| | |
|---|---|
| 1934: | Blæsende Gry. |
| 1938: | Noatun. |
| 1949: | Den sorte gryde. |
| 1950: | De fortabte spillemænd. |
| 1952: | Moder Syvstjerne. |
| 1964: | Det gode håb. |
| 1976: | Tårnet ved verdens ende. |